StÍF-H71 32-38 (15-17):

Hoyvíkingar móti oddinum

Triðja dystin á rað tóku hoyvíkingar alt. Hesa ferð á Skála, har tað ikki lá plagar at vera lætt at spæla

HONDBÓLTUR
Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Tað er av álvara farið at lukta av metallið í Hoyvíkarhøllini. Eftir tepurt tap í fyrsta dystinum hevur H71 nú vunnið tríggjar ferðir upp í slag. Og at triði av hesum sigrinum kom í útidystinum móti StÍF, mundi ikki gera tað heila verri.

Kraft og tempo

Uppskriftin var tann sama, sum er nýtt við so hepnari hond higartil í árinum. Eina stóra verju, sum ger tað ógvuliga truplt hjá mótstøðuni at spæla tunt ella at skjóta seg ígjøgnum. Og so eina støðuga ferð á spælinum, sum snøgt sagt vindur mótstøðuna niður, soleiðis at tað í ár eru hoyvíkingarnir, sum skora upp á kontra'ini, og ikki øvugt.

Strandingar vóru tó leingi væl við. Fyri steðgin tóktust gestirnir anarrs at hava takið, men StÍF vildi tó ikki geva seg. Ivaleyst sat stórtapið frá seinasta vikuskifti eisini í monnunum, og tað vildu teir so ikki siggja nakra endurtøku av.

Tað eydnaðist eisini StÍF at økja um spenningin eftir steðgin. Eftir at hoyvíkingar annars høvdu økt munin upp í fýra mál, komu strandingar brádliga aftur í aftur, og tá Henrik Gerster eftir 40 minuttum valdi at taka time-out, var spenningur av álvara komin aftur í dystin.

Tíðarbilið hjálpti tó væl. Piti Negru og Høgni Joensen fingu neyðugu kassarnar, soleiðis at friður aftur fekst á spælið, og eftir hetta kom sigurin ikki í vanda. Heldur tóktist tað hinvegin, sum fall StÍF fullkomuliga frá hvørjum øðrum, og við eitt sindur størri neyvleika kundu hoyvíkingarnir væl havt vunnið enn størri seinastu løtuna.

Endurbygging

Men tað munnu teir tó ikki iðra seg um. Heldur man liðið í løtuni fegnast um góðu gongdina, sum fyribils hevur sett teir javnar við Kyndil og VÍF í oddinum, og so er spurningurin, hvussu tað fer at tørna út, tá júst Kyndil er mótstøðuliðið næstu ferð.

Strandingar munnu hinvegin ásanna, at endurbyggingarárið í ár illa fær endað við heiðursmerkjum. Tað er kanska heldur ikki tað, sum telur mest í verandi støðu. Og tað man heldur ikki vera nakar ivi um, at tað í longdini er skilagott hjá liðnum at koyra egnar leikarar fram í fremstu røð. Við neyðuga útlendska kryddinum er í øllum førum lítið at ivast í, at teir aftur kunnu hava eitt lið, sum fer at standa seg millum tey allarfremstu. Og so er tað jú eisini steypakappingin, sum StÍF av síðvenju plagar at standa seg væl í. Eitt heiðursmerki í hesari vildi í øllum førum havt við sær, at árið verður meira enn góðkent.

FAKTA UM DYSTIN

StÍF-H71 32-38 (15-17)
Málskjúttar
StÍF: Leivur Justinussen 10(3), Alexandur Johansen 7(3), Sveinur Justinussen 5, Bárður Danielsen 5, André F. Danielsen 4, Artur Johansen 1
H71: Henrik Gerster 10, Sigtór Andreasen, Halgir Dahl Olsen 6(1), Piti Negru 6, Niels Viggo Niclassen 3, Høgni M. Joensen 2, Olaf Vestergaard 2, Birgir Kass 2, Kent Failstrup 1
Brotskøst: StÍF 6, H71 4
Útvísingar: StÍF 3, H71 5
Dómarar: Uni Wardum & Hannis Wardum

Kyndil-VÍF 25-29 (13-13):

Ioana basti Kyndli

Rumenski stórskjúttin tók mest sum einsamøll um endan, og tað var nóg mikið til at basa Kyndli

HONDBÓLTUR
Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Kyndils-kvinnur er veruliga farið at stríðast fyri søkini, og sunnudagin var um reppið, at tað aftur rakk til stig
Mynd: Álvur Haraldsen

Hon hevur fyrr prógvað tað, og tað gjørdi hon eisini hesaferð.

Ioana Rápa man seinni árini hava verið tann kvinnuligi leikarin, sum hevur havt størstu einstøku ávirkanina á lið sítt. Og tó at hon enn eigur heiðurin sum ársins leikari til góðar, so er helst eingin, sum ivast í, at úrslitini hjá Vestmanna kvinnunum í ovurstóran mun eru tengd at henni.

Málverjar skaptu ójavnvág

Og tað var eisini tørvur á skotstyrkini sunnudagin. Kyndil, sum í eini tvey ár hevur verið á oyðimarkarferð, har at kalla einki hevur vilja borið til, tóktist vera ressað heilt nógv eftir javnleikin móti StÍF seinasta vikuskifti.

Fyri steðgin vóru tað eisini tær grønu, sum sýndu betra spælið, og bara ein røð av kanón-skotum frá Ioanu forðaðu fyri, at Kyndil av álvara hevði drigið frá undan steðginum.

Tað var tó eitt sjónligt brek hjá Kyndli, at Guðrun á Lágabø ikki fekk vart málið hesaferð. Uttan at taka nakað frá Vivian Dahl og Kirstin Andreasen, so er ein orsøk til, at Guðrun í fleiri ár varð mett millum bestu føroysku málverjarnar. Og tá VÍF so hevur so frægar málverjar sum Manuelu Stan og Tommu Petersen, so skapti tað eina ójavnvág í dystinum, sum Kyndil ikki megnaði at vinna á.

Munurin stóð við

Tað gekk tó fyri tað nógva heilt javnt fyri seg, men eftir at VÍF tíðliga í seinna hálvleiki togaði seg tvey mál framum, so megnaði Kyndil ongan tíð at koma aftur á javnt. Fleiri ferðir var nær við, men tað restaði alla tíðina tað seinasta pettið. Munurin stóð við, og tá hann so móti endanum eisini vaks, var leyst og líðugt hjá VÍF, sum av álvara slapp sær úr botninum á stigatalvuni.

Her er Kyndil framvegis á einum stigi, men skal metast eftir seinastu avrikunum, so er einki at ivast í, at stigini verða fleiri í tali. Við eini verju, sum hesaferð eisini vildi stríðast, fer liðið í øllum førum at verða ein munandi størri biti, enn tær hava verið seinnu árini, og so er spurningurin, hvussu langt tað fer at røkka á talvuni.

FAKTA UM DYSTIN

Kyndil-VÍF 25-29 (13-13)
Málskjúttar
Kyndil: Lotte Sørensen 13(4), Súsanna Petersen 6, Randi Wardum 3, Linda Weihe 1, Anja Midjord 1
VÍF: Ioana Rápa 18(5), Linda Johannesen 3, Annfríða Helgadóttir 2, Eyðritt Andreasen 2, Kirstin Helgadóttir 1, Alis Høghamar 1, Tórunn Jónálvsdóttir 1, Sára Jógvansdóttir 1
Brotskøst: Kyndil 4, VÍF 5
Útvísingar: Kyndil 3, VÍF 4
Dómarar: Kristian Johansen & Sámal Hansen.
Høvdu fult tamarhald á tí mesta

Hetta er stuttligt

Stríðsmaðurin hjá hoyvíkingum tykist njóta nú'ið og góðu støðuna hjá liðnum

HONDBÓLTSPRÁT
Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Ein av teimum heilt royndu leikarunum á H71-liðnum er Olaf Vesturgarð. Seinastu nógvu árini hevur hann verið ein av ímyndunum á liðnum, har hann ikki minst við einum ósvikaligum stríðsvilja hevur givið sítt íkast til avrikini.

Fyri tað nógva hava hesi tó ikki verið til nógv meira enn støður í botninum av talvuni. Okkurt árið hevur H71 tó otað seg frameftir, og Olaf dylir ikki fyri, at tað er gott lag í hópinum, nú liðið aftur tykist hava fingið ein upptúr.

– Nú eru sjálvandi bara fýra dystir farnir av árinum, men tað er einki at ivast í, at hetta er ein hugalig støða at vera í. Moralurin á monnunum er í øllum førum í toppi, so hetta er eitt sindur betri, enn tað plagar at vera, heldur hann.

– Ikki minst hava seinastu dystirnir oftanir verið tungir at koma ígjøgnum, tí seinnu árini hevur eingin niðurflyting verið, og tí hevur talan í rættiliga nógvum førum verið um púrasta týdningarleysar dystir, sum vit tá hava leikt. Eitt nú í fjør, tá kappingin fyri okkara viðkomandi var av, longu tá steypafinalan var leikt.

Ivaðist sjálvur

Tað vóru annars greið boð, sum vórðu meldað út, tá Henrik Gerster kom til sum venjari hjá hoyíkingunum í fjør. Innan tvey ár skuldi liðið vera at finna í oddinum av føroyskum hondbólti, men at byrja við mundu mong yppa økslat hesi útsøgnini.

– Sjálvur haldi eg heldur ikki, at eg trúði so nógv upp á hetta at byrja við, sigur Olaf.

– Men vit fingu kortini nakað burtur úr árinum í fjør, og í ár hava vit so eisini fingið góða tilgongd. Birgir Kass, Piti Negru og Sigtór Andreasen eru komnir til, og ikki minst hevur tað styrkt breiddina í hópinum. Soleiðis fáa einstøku leikararnir munandi meira hvíld ígjøgnum ein dyst. Vit skifta nógv út, og kunnu tí koyra við fullari ferð alla tíðina, og tí hava vit eisini fingið betri nyttur burtur úr stóru verjuni, heldur Olaf.

Sum sagt, so er árið tó enn stutt. Og veteranurin hjá H71 ásannar eisini, at enn eru trøini so ikki vaksin inn í himmalin.

– Nú fáa vit at síggja. Men higartil hevur talan í øllum førum verið um eina óvanda støðu, sum er óluksáliga stuttlig at vera í. Ikki minst, tá mann nú er vorðin so gamal sum eg, sigur tann 39 ára gamli Olaf Vesturgarð at enda.

Stjørnan-Søljan 39-22 (17-12):

Hol á spenningsballónina

Søljan var ongan tíð í nær námind at taka Stjørnuna, sum so ruddiliga staðfesti, at tær eru liðið, sum skal takast, um nakar annar skal gera sær vónir um gullið

HONDBÓLTUR
Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Tað var bæði ferð og kraft í gjøgnumbrotsroyndunum hjá Stjørnuni, og millum annað kastaði hetta hópin av sær brotskøstum av sær
Mynd: SáH

Soleiðis sum kvinnukappingin hevur lagað seg fyrstu umførini, so hava greiðar ábendingar verið um, at talan kann gerast um eina heilt spennandi kapping. Eina kapping, har Stjørnan og VB eru stóru favorittarnir, men har bæði Neistin og Søljan hava givið greið tekin um, at tey so sanniliga eisini vilja bíta frá sær.

Ballónin brast

Men sunnudagin mundi ein partur av hesum spenningi fara úr ballónini. Dysturin millum Stjørnuna og Søljuna varð frá fleiri síðum sagdur at vera eitt slag av próvtøku. Ein próvtøka, har Søljan skuldi vísa, um tær veruliga skulu vera við í oddinum, og har Stjørnan skuldi vísa, at tær eiga stigini, tá leikt verður í Klaksvík.

Og tað kann helst róliga sigast, at tað var Stjørnan, sum stóð hesa próvtøkuna. Frá fyrsta bríksli vóru leikararnir tendraðar, og áskoðararnir mundu neyvan trúgva, at hetta vóru júst tær somu, sum fyri einari viku síðani vóru hepnar við at toga ein sigur á Neistanum heim.

Ferðin varð skrúvað í topp alt fyri eitt. Gjøgnumbrotsroyndirnar vóru bæði títtar og kraftmiklar, og alt fyri eitt kastaði hetta nøkur brotskøst av sær. Brotskøst, sum annars skadda Annika Ljósstein setti trygt í netið.

Søljan royndi at fylgja við eftir førimuni, men tað stóð teimum skjótt greitt, at her var onkra staðni millum lítið og einki at gera. Sum dysturin leið, so bara vaks munurin, og senastu 20 minutturnar kundi Stjørnan veruliga seta trumf á. Kreftirnar hjá Søljuni vóru við at vera uppi, og tá Stjørnan so samstundis koyrdi í einum at kalla sálarligum rúsi, har alt bar til, skrædnaði av álvara. 39-22 er kanska ikki veruliga mátingin fyri styrkismunin millum liðini bæði, men júst hendan dagin var tað reglan.

Mugu ressast

Og so man fáur ivast í, at Stjørnan av álvara er um at koyra kanónirnar í skotstøðu. Ein vansi á liðnum kann tó kanska vera, um Joan M. Djordjevic ikki verður tøk til allar dystirnar. Higartil hevur tó borið til at flogið hana heim til dyst, og tó at tey í Stjørnuni tykjast ivast í, hvussu ofta hetta er neyðugt, so hevur avgerðin hvørja ferð verið játtandi higartil.

Hjá Søljuni man tað nú einamest vera avgerandi, at liðið fær lyft seg aftur sálarliga. Tvey tap á rað kunnu vera tung at bera, men tá hesi eru ímóti teimum báðum liðunum, sum á pappírinum verða roknað sum tey sterkastu, so er tað eingin skomm í sjálvum sær. Í hinum dystunum hevur liðið eisini víst, at tær vilja vera við í oddinum í vetur, og so ræður um at fáa hondbóltslagið uppaftur. Næst avbjóðingin eitur Kyndil á heimavølli, og tað er í øllum førum ein dystur, sum skal vinnast, um hald skal vera í tosinum um heiðursmerki.

FAKTA UM DYSTIN

Stjørnan-Søljan 39-22 (17-12)
Málskjúttar
Stjørnan: Bára S. Klakstein 11(1), Annika Ljósstein 8(8), Alina Olaru 5, Anna Kristina Samson 4, Una Olsen 4, Maria við Neyst 3, Katarina Stepanov 2, Louisa Andreasen 1(1), Joan M. Djordjevic 1
Søljan: Nicoleta Radu Hansen 8(1), Arnleyg Haraldsen 5(1), Heidi Maria Akselsen 3, Hertha Simonsen 2, Fía Selma Nielsen 2, Lina Andriulyte 1, Kristianna Petersen 1
Brotskøst: Stjørnan 11, Søljan 3
Útvísingar: Stjørnan 4, Søljan 6
Dómarar: Brandur Johannesen & Heri Petersen

Inn til brotskøstini

Annika Ljósstein fær ikki spælt hondbólt fyrstu mánaðirnar, men brotskøstini kann hon tó taka sær av

BROTSKASTSKJÚTTI
Jákup Mørk

– Nú kann eg í friði og náðum fyrireika meg til, tá eg næstu ferð skal inn at skjóta, sigur Annika um nýggju støðu sína á liðnum

Hóast tað fyri fáum vikum síðani stóð á hesum síðum, at Annika Ljósstein vegna skaða ikki fór at verða á liðnum hjá Stjørnuni komandi mánaðirnar, so taldist hon millum málskjúttarnar sunnudagin.

Ikki færri enn átta ferðir slapp navn hennara á listan, men tað merkir tó ikki, at skaðin er minni álvarsligur, enn roknað varð við. Øll átta malini vórðu nevnliga skotin við brotskasti, og hetta var so eisini tað einasta, sum Annika gjørdi á vøllinum.

– Tað komst kanska einamest av tí, at eg havi gingið og argað hinar á liðnum við, at eg burdi bara tikið mær av brotskøstunum, so vit fingu sum mestu nyttuna úr hesum. Og tá vit so brendu 4 av 7 brotskøstunum móti Neistanum, varð eg brádliga tikin upp á orðið.

– Eg kundi nærum bitið tunguna av mær sjálvari, men tað gekk í øllum førum væl, og sum dysturin lagaði seg, so gjørdi eg eisini tey fyrstu trý málini hjá okkum, sigur hon flennandi.

Sjálv hevur Annika annars ikki altíð verið nakar tryggur brotskastskjútti, og átta av átta møguligum man vera at kalla eindømi fyri hennara viðkomandi. Hetta hevur tó eisini sína frágreiðing, tí sjálv heldur hon, at tað er munandi lættari at skjóta, tá hon ikki hevur annað at hugsa um.

– Nú kann eg í friði og náðum fyrireika meg til, at eg næstu ferð skal inn at skjóta. Ikki minst hjálpir tað eisini væl, at vit hava tveir góðar málverjar, og tí kann eg diskutera við tí, sum situr uttanfyri ta løtuna, hvussu eg skal skjóta hvørt skotið. Tað vísti seg í øllum førum at rigga heilt væl hesaferð, staðfestir.

Um skaðan, sum hon altso framvegis dregist við, sigur Annika, at hon í løtuni ikki veit, nær hon kann spæla aftur.

– Tað er festið til aftara krossbandið, sum er rivið nakað. Enn vilja læknarnir ikki leggja tað undir skurð, so fyrstu mánaðirnar eru boðini, at eg skal gera servenjingar av ymsum slag, og so er vónin, at tað lagar seg aftur sjálvt. So tað verður nokk ikki fyrr enn einaferð eftir jól, at vit fáa at síggja, hvussu verður við hesum, staðfestir Annika at enda.

Rosenborg aftur meistari

13. árið á rað eydnaðist Rosenborg at tryggja sær meistaraheitið í norskum mansfótbólti. Hesaferð stóð tó heilt nógv á, og tað vóru bara talið av skotnum málum, sum skiltu Rosenborg og Lyn. Undan seinasta umfarinum stóð nevnliga á jøvnum í málmuni, og tá liðini vunnu ávíkavist 4-1 og 3-0 á seinasta leikdegnum, helt javnstøðan sær heilt fram til tað seinasta. Rosenborg hevði tó flest skotin mál, og so kundu teir enn einaferð heingja gullmerkina um hálsin.

-jm

Klárt til Royal League

Eftir at norska kappingin endaði um vikuskiftið, er endaliga staðfest, hvussu bólkarnir í nýggju Royal League koma at síggja út. Samansetingin er soleiðis, at hvør bólkur telur ein eittara og tvey'ara úr ávíkavist Danmark, Svøríki og Noreg.

Enn er endaliga dystarskráin ikki løgd, men ymsu bólkarnir síggja soleiðis út: Í bólki 1 eru Rosenborg, Vålerenga, Esbjerg og Djurgården. Í bólki 2 eru FCK, Brøndby, IFK Gøteborg og Tromsø, og í bólki 3 eru so Malmö FF, Halmstad, Brann Bergen og OB.

-jm